Fíggjarmálaráðið

Dagfesting:	05.03.2021
Mál nr.:	21/00058
Málsviðgjørt:	JEK
Eftirkannað:	25. februar 2021

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald (Meirvirðisgjaldslógin)
(Mvg-frítøka fyri útleigan av kampingplássi)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 136 frá 8. september 1992 um meirvirðisgjald (Meirvirðisgjaldslógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 19 frá 24. februar 2021, verður § 12, stk. 1, litra j orðað soleiðis:

"j) Útleigan av kamari á hotelli, gistingarhúsi o.tíl. og útleigan av kampingplássi."

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið
Uppskotið er gjørt fyri at betra kappingarstøðuna hjá kampingplássum, soleiðis at útleigan av kampingplássi verður javnsett við útleigan av kamari á hotelli og gistingarhúsi við atliti at meirvirðisgjaldi.

1.2. Galdandi lóggáva
Sambært galdandi lóggávu er útleigan av kamari á hotelli, gistingarhúsi o.tíl. undantikin meirvirðisgjaldi. Útleigan av kampingplássi er hinvegin avgjaldsskyldug, bæði tá kampingplássið er privat, og tá kampingplássið er kommunalt.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Endamálið við uppskotinum er at javnseta útleigan av kampingplássi við útleigan av kamari á hotelli og gistingarhúsi við atliti at meirvirðisgjaldi.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Við uppskotinum verða reglurnar fyri útleigan av kampingplássi javnsettar við reglurnar fyri útleigan av kamari á hotelli og gistingarhúsi.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Uppskotið hevur, orsakað av stutta skotbránum Fíggjarmálaráðið hevur havt til at skriva uppskotið, ikki verið til hoyringar.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri landið, men ikki fyri kommunurnar.
Avleiðingarnar eru avmarkaðar. Mett verður, at talan er um 250.000 kr. um árið. Hetta er mett við miðaltølum frá 2018 til 2020.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið lættir um umsitingarliga hjá TAKS.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið lættir um fíggjarliga og umsitingarliga hjá kampingvinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Tað eru ikki millumtjóðasáttmálar á økinum, ið lógaruppskotið fevnir um.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Tað eru ikki tvørgangandi millumtjóðasáttmálar, sum eru viðkomandi fyri lógaruppskotið.

2.9. Markaforðingar
Tað eru ikki kendar markaforðingar á økinum.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir ella pantiheimildir, og lógaruppskotið ger heldur ikki onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki.

2.11. Skattir og avgjøld
Við uppskotinum verður kampingvinnan javnsett við hotellvinnuna við atliti at meirvirðisgjaldi.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið leggur ikki skyldur á likamligar ella løgfrøðiligar persónar.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Uppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn uttan rættarúrskurð.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Ja
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Við uppskotinum verður útleigan av kampingplássi javnsett við útleigan av kamari á hotelli og gistingarhúsi við atliti at meirvirðisgjaldi.

Til § 2
Áseting um gildiskomu.

Fíggjarmálaráðið, 05. mars 2021

Jørgen Niclasen
landsstýrismaður

/ Bjarni Askham Bjarnason

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur